# Listasavnið verður liðugt í ár

**Týsdagin varð enn eitt stig tikið á leiðini fram móti einum listasavni á Sandi. Økið er útgrivið, og nú er forskallingin komin uppá pláss á økinum mitt í bygdini**

LIST
*Snorri Brend*

**Sandur:** Tað sum fyri mong tóktist meiri sum eitt gott hugskot, verður nú til veruleika.

Tað kom fram fyrr í ár, at heimasandsmaðurin Sofus Olsen hevði í hyggju at lata listarverk úr sínum egna savni til eitt listasavn í føðibygdini.

Hetta málið hevði sum vera man almennan áhuga, og fyri kommununa á Sandi var hetta eisini eitt mál, sum varð møtt við opnum ørmum.

Í summar var so farið undir at grava út fyri økinum miðskeiðis í bygdini, og týsmorgunin kom so ein stórur lastbilur við teirri forskallingini, sum brúkast skal til sjálvt stoypiarbeiðið.

Heldur tíðarætlanin við bygginini, so er ikki óhugsandi, at hetta forkunnuga listasavnið fer at standa liðugt áðrenn ársskiftið.

- Tað er so í øllum førum ætlanin, sigur borgarstjórin, Páll á Reynatúgvu við Sosialin.

Kommunan fer sjálv at lata 200.000 kr. í stuðli til ætlanina, sum íalt fer at liggja um 2 mió. kr.



*Menn hjá Articon eru komnir við forskallingini til stoypiarbeiðið til nýggja listasavnið á Sandi. Tað skal standa liðugt í ár*

Mynd: Jens Kr. Vang

### Ljós høli

Sofus Olsen hevur áður sagt, at hann hevur arbeitt við hesi ætlanini í eini fimm ár.

Hann ynskti nevniliga at verða liðugur við allar fyrireikingarnar áðrenn hann fór víðari við ætlanum sínum.

Sum skilst er ætlanin at hetta listasavnið skal hýsa málningum, harav fleiri teirra eru eftir kend føroysk listafólk. Hetta er helst tað mest forkunnuga privatsavnið her á landi.

Savnið verður í tveimum hæddum, sum verða klæddar við viði eins og ljósviðurskiftini verða góð. Tað kemur at liggja mitt í bygdini á einum grundøki, sum Sofus sjálvur eigur.

Tað er byggifelagið Articon, sum stendur fyri arbeiðinum.

### Fyrst savn – síðani skúli

Borgarstjórin á Sandi fegnast eisini um hetta savnið. Hetta fer í fyrstu atløgu at geva fólki møguleika at síggja øll hesi verkini, og síðani at geva listafólkum møguleika at arbeiða undir góðum umstøðum.

- Eg ivist tí onga løtu í, at hetta listasavnið fer at hava stóran týdning fyri mentanina í okkara bygd, men eisini fyri mentanina í allari oynni, hevur hann áður sagt við Sosialin.

Hetta verður samstundis fyrsta veruliga listasavnið uttanfyri høvuðsstaðin. Og her verður eisini ein verkstova, har listarfólk fáa møguleika at útfolda seg við sínum gávum.

Hinvegin so er eisini mong, sum vóna at listasavnið fer at birta upp undir aftur tjakið um ætlaða listaskúlan á Sandoynni.

ÚTBJÓÐING

## Landsvegur Skála – Strendur, 4. stig

**Við hesum verður 4. stig av arbeiðinum at gera landsveg millum Skála og Strendur boðið út í almenna lisitatión.**

Arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku og fevnir um gerð av 10 m breiðum landsvegi, frá Hulki og norður til Prestá, umleið 1350 m, herundir gerð av betongbrúgv um Stóruglyvur.

Arbeiðið skal vera liðugt í seinasta lagi 24. juli 2006.

Lisitatiónin verður á Landsverki týsdagin 27. september 2005, kl. 10.00.

Ástaðarfundur verður mikudagin 21. september 2005, kl. 10.00.

Útbjóðingartilfarið verður at bíleggja hjá:

sc@lv.fo
Telefon: 540 857

Tilfarið verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 5.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 9181-134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

# 100 uppá ein fyrrapart



*Aftur í dag at landi við hópin av havhestaungum*

Mynd: Jens Kr. Vang

**Skopun:** Hann er ein av teimum ídnu, tá talan er um at fara eftir havhestaungum. Og í góðveðrinum týsdagin var einki undantak í so máta.

Salli Lognberg legði frá landi við báti sínum fyrrapartin, og passaði tað soleiðis við sjóarfallið, at hann kundi vera aftur í Skopun um tvey-tíðina.

Og tá teir løgdu at landi aftur høvdu teir fingið 100 nátar.

**sb.**

# Tørvur á vinnuøki

**Gøta:** Á eyka bygdaráðsfundi í farnu viku samtykti Gøtu bygdaráð, at fara undir at dagføra ætlanirnar á vinnuøkinum í Gøtudali.

Arbeiðið verður bjóðað út í heyst, og er ætlanin at fara undir vegagerð o.a. fyrst í komandi ári.

- Áhugin fyri økinum tykist sera stórur, og hongur hetta helst saman við, at undirsjóðartunnilin millum Eysturoynna og Borðoynna verður liðugur komandi ár, verður sagt frá Gøtu kommunu. **sb.**